# Løgfrøðingur til Tryggingareftirlitið

Tryggingareftirlitið søkir við hesum eftir lógfrøðingi at byrja sum skjótast.

Uppgávan hjá Tryggingareftirlitinum er at hava eftirlit við tryggingarvirksemi smb. løgtingslóg nr. 3 frá 13. februar 1996 um tryggingarvirksemi (§ 157). Eftirlitsskyldan er nærri lýst í kunngerð nr. 3 frá 13.01.1997 um eftirlit við tryggingarvirksemi, har m.a. er ásett, at Tryggingareftirlitið skal javnan kanna viðurskiftini hjá tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum.

**Uppgávur hjá lógfrøðinginum**
Arbeiðið hjá lógfrøðinginum fevnir í høvuðsheitum um:
- at tilevna lóggávu og mannagongdir á tryggingarøkinum
- at menna løgfrøðiliga førleika stovnsins á tryggingarøkinum
- at menna eftirlitsvirki stovnsins
- at gera kanningar um tryggingarviðurskifti

Harumframt kunnu verða uppgávur at loysa fyri kappingarráðið, Post- og Fjarskiftiseftirlitið.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava:
- Lógfrøðiligt embætisprógv
- góð analytisk evni
- góðan kunnleika til føroyskt og enskt

Umsøkjarar skulu vera førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, hava hegni til at samstarva og kunna arbeiða undir trýsti.

**Tryggingareftirlitið kann bjóða**
Eitt sera fjøltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum, sum eru persónliga og yrkisliga mennandi umframt møguleika fyri samskifti við tryggingarmyndugleikar í grannalondum okkara.

Skeið og eftirútbúvingarmøguleikar innan tryggingarøkið.

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við búskapar- og lógfrøðingafelagið. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýrir.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

**Tryggingareftirlitið**
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 18. november 2002.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Thomsen, stjóra, tlf. 356020 ella 216050.

Tryggingareftirlitið er sett sambært løgtingslóg nr. 3 frá 12. februar 1996 um tryggingarvirksemi. Tryggingareftirlitið hevur felags stjóra og skrivstovu saman við Kappingarráðnum, Post- og Fjarskiftiseftirlitinum.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Mentanarstuðul
### frá mentamálanevnd Tórshavnar býráðs

2 ferðir um árið, um várið og um heystið, er møguleiki at søkja um stuðul frá mentamálanevndini.

Stuðulin verður veittur einstaklingum og feløgum í kommununi til tiltøk, ið verða hildin at hava týdning fyri mentanarlív kommununnar.

Fyri at fáa stuðul, skal vera sýnt í verki, at álvara er aftan fyri tiltakið.

Grundgevast skal fyri umsóknini, og eigur fíggjarætlan/roknskapur at fylgja við umsóknini, so metast kann um studningstørvin hjá viðkomandi felagi, luttakara ella persóni.

Meiri fæst at vita um stuðulin frá Jákupi Simonsen, deildarleiðara, á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

Umsóknir skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 18. november 2002. Merk umsóknina "Mentanarstuðul".

SNARSKIVAN

*Leikhúsið Gríma*
framførir
## *Ginu-søgur*
eftir Eve Ensler
leikstjórn Ria Tórgarð
á Meiarínum

**leygardagin 19. oktober kl. 18.00**
**EYKASÝNING:**
**leygardagin 19. oktober kl. 22.00**
**sunnudagin 20. oktober kl. 18.00**
**týsdagin 22. oktober kl. 20.00**
**mikudagin 23. oktober kl. 20.00**

Atgongumerki á kr. 125,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

FA. GRAVSTEINAR




Opið: mánadag - fríggjadag 9[00]-17[00]
annars sambært avtalu.
Vøruskrá kann fáast!

VREDESTEIN DEKK

T-Trac | Icetrac | Snowtrac



Transport Snow
Serliga vælegnað tilvøruvognar og lítlar lastbilar. Ger, at bilurin bremsar væl í hálkuni.

Einastandandi pikadekk við heili 12 rekkjum av píkum

Sera gott vetrardekk. Vælegnað á vátum kavakløddum og glerstoyttym vegum

BILVERKSTAÐ v/ Edvin Hammer
Undir Heygnum 22 • 100 Tórshavn • Tel 313378

## Bakarasveinur

Søkt verður eftir røskum bakarasveini, at byrja sum skjótast.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

P/F HJÁ GUNLEIVI

Tlf. 22 88 38 ella 31 21 61

## Plátusmiður

P/F Wenzel søkir eftir dugnaligum plátusmiðji til plátuverkstað okkara at byrja skjótast gjørligt. Viðkomandi hevur møguleika at leiga sær eina íbúð við úsýni yvir alla havnina frá okkum.

**P/F Wenzel**
Akranesgøta 5 · 100 Tórshavn
Tlf. 354500
Att.: Antonius Dalsgaard

**Søkt verður eftir lærlingi til eykalutagoymsluna**

**FHS-prógv er ein fyrimunur. Hevur hetta tín áhuga, send eina skrivliga umsókn til:**

**Bilasølan**
v/ Øssur Johannesen
postboks 3192
110 Tórshavn
Tlf. 315354



SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

## Lær at nýta ROKNIARK

Skeiðið er ætlað teimum ið vilja læra rokniark frá grundini.
Tú lærir hvussu eitt rokniark skal handfarast, hvussu tú stillar rokniarki til tín tørv og hvussu tú nýtir hentleikar ið létta um arbeiðið.
Tú lærir eisini at goyma, heinta og at skriva út.

**25/10 + 08/11 + 15/11**
**kl. 09:00 - 12:00**

Onnur skeið í hesi skeiðrøð:

**Lær at nýta teldu**
15/11 + 18/11
kl. 08:30 - 15:30

**Lær at nýta Internetið**
22/11 + 29/11 + 06/12
kl. 09:00 - 12:00



telefon 320 204 kvasir.fo

# SKUNDA TÆR –
áðrenn sensururin kemur!!!

~~GINU~~ SENSUR - SØGUR



## KOM OG DANSA Í PLATFORM
MÁNAKVØLDIÐ TANN 21. OKTOBER

Læri m.a. Line dans við Miu Cameron og Arnfríðu Rubeksen

Tiltakið verður fyri bæði gentur og dreingir frá 13 - 17 ár

***kl. 19.30 - 21.30***

Royk- og rúsfrítt sjálvandi

Sodavatn ella Sunkist verður eisini at fáa til keyps

**KOSTNAÐURIN:**

Við +Korti frá Føroya Sparikassa verður kostnaðurin kr. **25,-**

**40,-**

Lesið meira í smálýsingunum undir "dans" í bløðunum.

Um tit hava psurningar, er møguleiki at ringja til foreldrabólkin:
Sólrun 210780 · Tone 261165 · Lise 260334

LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Aðalstjóri til Almannamálaráðið

Samsvarandi stýriskipanarlógini, er avrátt at býta Trivnaðarmálaráðið í tvey, so at landsstýrismenninir í ávikavist familju- og heilsumálum og almannamálum, hava hvør sína fyrisiting. Søkt verður tí eftir aðalstjóra til Almannamálaráðið.

**Starvið**
Aðalstjórin er ovasti ráðgevi hjá avvarðandi landsstýrismanni og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Almannamálaráðnum. Almannamálaráðið fyrisitur almannamál og javnstøðumál.

**Arbeiðsøkið fevnir í høvuðsheitum um at:**
- samskipa uppgávur innan almannaøkið
- umsita almannamál, herundir javnstøðumál
- fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan alt virkisøkið
- gera samfelagsvísindaligar útgreiningar innan almannaverkið
- hava eftirlit við stovnum undir Almannamálaráðnum og
- aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

**Almenn førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving frá lærdum háskúla og hava leiðsluroyndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum ella útbúgving og royndir, ið metast javnsetast við hetta. Umráðandi er, at tann, ið settur verður, hevur evnið at seta í verk fyriskipanir, hevur nútíðar leiðslueginleikar, góð greiningarevni, innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting. Dentur verður lagdur á persónligar eginleikar so sum evni til at eggja og menna leiðarar og starvsfólk, góð samstarvsevni, vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga fyri avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og er flokkað í 39. lønarflokki umframt eina ikki eftirlønargevandi viðbót uppá kr. 3.984,75 um mánaðin. Starvsheitið er aðalstjóri. Setanarøkið fevnir um Almannamálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hinar ráðstovurnar. Tænastustaðurin í løtuni er Almannamálaráðið.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttir, løgmansstjóra, tlf. 35 10 10.

**Umsókn**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli, skulu stílast til løgmann, og sendast til
Løgmansskrivstovan
att.: Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri
Postsmoga 64
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi mánadagin 4. november 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**i**
Sosialurin

## Pensiónistaskeið

Enn eru pláss eftir á skeiðinum

**27. november til 6. desember**

Útferðir, fyrilestrar, kvøldsetur og mangt annað til gamans og álvara.
Kostnaður:
støk: kr. 1.800,- / hjún: kr. 2.400,-
vistarhald íroknað.

*Føroya Fólkaháskúli*
*Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn*
*Telefon 311743 - Telefax 319687*
*E-Mail: ffh@skulin.fo*
*Heimasíða: www.skulin.fo/ffh*